

# Føroyskur m

**Klaksvíkskvinnan Vivian Slyne telist nú millum mongu mótahandilsfólkini á kendu Miðalhavsoynni Mallorca. Herfyri lat hon upp snotuligan mótahandil í høvuðsstaðnum Palma. Skreytlutirnir hjá Tórgerð Suðuroy ganga longu sum heitt breyð, og skjótt verða Guðrun & Guðrun vørur eisini á handilshyllunum. Úr litfægra handlinum ljómar føroyskur tónleikur út á handilsgøtuna og fær forvitnar turistar at støkka inn á gólvið. Og har tekur smílandi og fryntliga havnarkvinnan Hjørdis Klein ímóti teimum**

HANDILSLÍV
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tá Sosialurin og Rás2 komu framvið mótahandil í mest vitjaðu handilsgøtuni á Mallorca ljómaðu tónarnir frá Frændum út á gøtuna. Og í hurðini stóð Vivian Slyne, sum saman við øðrum hevur latið upp sín fyrsta mótahandil á hesi kendastu ferðavinnuoynni í Miðalhavinum.

Vivian og Petur Slyne fluttu til Mallorca fyri knøppum ári síðani. Tey búgva í høvuðsstaðnum Palma. Petur tekst við grafiskt arbeiði fyri fyritøkuna Ikon í Føroyum. Einki er til hindurs fyri at kunna sita á skrivstovu á Miðalhavsoyggj og arbeiða fyri fyritøku í Føroyum. Tvørturímóti fær hann meira frið her til sítt arbeiði.

Vivian hevur valt sær nýggja lívsleið. Eftir at hava arbeitt sum frisørur hevur hon nú valt handilsyrkið. Og hon hevur tikið rættiliga stóra og heldur óvanliga stigið at lata upp mótahandil í tí annars sera lívligu handilsgøtuni mitt inni í Palma býi.

-Eg havi leingi hugsað um at royna nakað nýtt eftir at hava havt frisørsalong í 17 ár og havi so brúkt hesa tíðina á Mallorca at hugsa um, hvat nýtt eg kundi finna uppá, og so kom hugskotið at lata ein handil upp.

*Vivian uttanfyri snotuliga KERA handilin, sum ikki smæðist burtur millum hundraðtals mótahandlarnar í Palma býi á Mallorca.*

*Mynd: Jan Müller*

## KERA FASION

Tað eru umleið tvær vikur síðani, at Vivian lat mótahandilin KERA FASION upp mitt í hjartanum á Palma. Ein djørv og spennandi avgerð, nú tað longu eru hundraðtals mótahandlar har frammanundan. Men Vivian ynskir so at koma við nøkrum nýggjum, sum aðrir handlar ikki hava. Í fyrsta lagi merki úr Norðurlondum. Hetta eru dýrar vørur men eru á sera høgum støði.

-Vit hava so eisini tikið nøkur bíligari merki men síggi eg longu nú, at tað er ikki so lætt, nú her eru so nógvir handlar við bíligum vørumerkjum úr Spania. So har kann eg ikki kappast. Men tað er gott, at man longu eftir eini viku kann finna út av, hvønn veg man skal fara.

Vivian sigur, at hon fer eisini at selja føroysk merki og hevur tosað við Guðrun og Guðrun og aðrar designarar í Føroyum um at selja teirra vørur. Tó so at tað longu finnast vørur framleiddar í Føroyum á hyllunum. Tað eru skreytlutir frá Tórgerð Suðuroy, sum higartil hava selt sum heitt breyð.

–Vit fara at leggja okkum eftir at marknaðarføra Føroyar og føroyskar vørur, og vit hava fingið katalog við myndum úr Føroyum, sum verða skrødd burt sigur Vivian, meðan føroyskur tónleikur frá Frændum rungar út úr hátalarunum.

Og hon leggur aftrat: –Kunnu vit eisini marknaðarføra føroyskan tónleik her á Mallorca eisini, so vilja vit fegin gera tað.

Vivian er annars ikki einsamøll um nýggja og spennandi KERA konseptið. Navnið er rættiliga sjáldsamt og persónligt. Tað er sprottið úr hugtakinum, sum vit í Føroyum úttala "kjera". Hon hevur eisini aðrar partnarar í Føroyum, sum hava sett pengar í nýggju verkætlanina. Ætlanin er at lata upp enn ein kvinnumótahandil í august ella september, so longu nú verður leitað eftir øðrum hølum. Hetta er bert byrjanin. So verður ein mannfólkahandil latin upp til jóla.

## Gott stað

Vivian hevur ein son, sum gongur í 9. flokki í Føroyum. Hann kemur til Mallorca, nú skúlaárið endar. Hon hevur eisini ein son uppá 5 ár, sum gongur í sponskum skúla í Palma. So frá nú av tekur Vivian tað, sum tað kemur.

Sjálv er hon sera fegin um nýggja heim sítt. –Hetta er eitt oyggjaland eins og Føroyar, og her er ótrúliga gott at vera. Eg havi verið her einar sjey átta ferðir, áðrenn eg flutti hertil at búgva. Eina løtu hugsaðu vit okkum at fara til Barcelona á meginlandinum, men okkum dámar betur oyggjaland, so her verða vit í hvussu er fyri fyrst. Her eru sjálvandi nógv ferðafólk og verður alt sjálvandi merkt av tí. Men kortini er her nógv lokalt, sum sermerkir gerandisdagin. Fólk eru sera fryntlig, og tú kennir teg vælkomnan. Sagt verður at tað búgva umleið ein millión fólk á Mallorca men taka vit tilflytarar og ferðafólk við so búgva her eini átta milliónir fólk alt árið.

